# Hvør brúkar minst bensin?

FIAT-umboðið í Føroyum er farið undir eina kapping um, hvør kann koyra við minstu bensinnýtslu.

Talan er um, hvør kann koyra ein FIAT 127 CL 900 9,3 km og brúka sum minst bensin og ikki yvir 21,6 minuttir.



Frits Jensen og Henry Koba Jensen gera klárt til fyrsta túrin í føroysku kappingini. Bæði fyri og eftir hvønn túrin verður tann serligi bensintangin vigaður. Hava fleiri luttakarar somu bensinnýtslu, vinnur tann, sum hevur stytstu tíðina

Kappingin er ein partur av eini landsumfatandi kapping í Danmark, sum byrjaði 15. mai og endar 15. juni. Í Føroyum verður kappast frá 31. mai til 30. juni. Kappingin endar við eini finalu í Keypmannahavn í august. Nordisk Fiat A/S rindar flogferðina fram og aftur og uppihald í Keypmannahavn í 4—5 dagar.

Upplýst verður, at tann kendi bilblaðmaðurin, Mogens H. Damkier, longu hevur koyrt finalurutuna, sum er 28 km. long. Hann koyrdi 19,68 km/l.

## Serligur bensintangi

Øll, sum hava koyrikort, kunna taka lut í kappingini. Tey, sum vilja royna seg, skulla seta seg í samband við Frits Jensen, Gundadali, og avtala eina tíð. Viðkomandi fær so handað eitt skjal, sum prógvar, at hann er tilmeldaður, umframt ein bókling »Spar på benzinen,« sum orkusparinevndin hjá danska handilsmálaráðnum hevur givið út í samarbeiði við FDM. Allir luttakararnir koyra í sama bilinum, einum spildurnýggjum FIAT 127 CL 900. Til kappingina verður ein serligur bensintangi brúktur. Hann tekur tveir litrar.

Kappingarrutan er hendan: Frá Frits Jensen í Gundadali verður koyrt omaneftir R. C. Effersøesgøtu og Jónas Broncksgøtu. Síðani eftir Kongabrúnni, Åarvegi, Sverrisgøtu, Dr. Jacobsensgøtu, J. C. Svabosgøtu, Velbastaðvegnum, Landavegnum, Marknagilsvegnum og haðani eftir Dalavegnum niðan á Oyggjarvegin og so oman aftur til Frits Jensen.

Hesin túrur 9,3 km, skal taka 18 minuttir + ÷ 20%, altso millum 14,4 og 21,6 minuttir. Motorurin skal vera í gongd alla tíðina.




**Kappingin byrjaði týskvøldið við, at Jákup Lindenskov og Pauli Ellefsen royndu seg. Jákup koyrdi 15,00 km/l og Pauli 16,34 km/l.**

**Hvør luttakari, sum stendst royndina, fær eitt »Diplom« við navni sínum og úrslitinum á umframt eina troyggju, sum er gjørd serliga til hesa kappingina.**

**Einaferð um vikuna verður støðan, t.e. tey 12 bestu úrslitini, lýst í bløðunum**